# Abort.fo

**Endamál okkara er at leggja pall til røddir ið stríðast fyri eina tíðarhóskandi dagførðing av abort lóggávuni í Føroyum. Tað er okkara sannføring at Føroyar eiga at standa á odda á abortøkinum. Harumframt er tað okkara sannføring at ein og hvør abortlóggáva, skal grunda á tíðarhókandi heilsufrøði og menniskjarættindi, við ástøði í abort viðmælunum hjá Altjóða Heilsustovninum.**

Vit stuðla og hava fult álit á abort pillarar og tey ið brúka tær. Misoprostol eina ella samansett við mifepristone, er ein heilivágur ið hevur kollvelt abortstríðið. Sambært Altjóða Heilsustovninum er hesin heilivágurin millum allarneyðugastu og grundleggjandi heiluvágum í heiminum, og øll skullu hava fría atgongd til at sjálvveita sína abort við misoprostol upp til 12 vikur líkamikið lóg, stigma ella hvat ið ein lækni heldur.

**Stuðla og fylg virksemi okkara at avkriminalisera, avstigmatisera og avmedikalisera abort í Føroyum, og kunna um viðmælini hjá Altjóða Heilsustovninum.**

*Abort.fo*

## EIN TÍÐARHÓSKANDI ABORTLÓGGÁVA

Føroyar eiga at áseta viðmælini um abort hjá Altjóða Heilsustovninum

https://linktr.ee/abort.fo




*2025*

# Innihald:

**1)** Innleiðing

**2)** Grundarlag

**3)** Ein tíðarhóskandi abort lóggáva

**a)** Abort treytir

**b)** Abort markið

**c)** Kriminalisering

**d)** Veitingar møguleikar

**e)** Sjálvveiting

**f)** Málnýstla

**4)** Samanumdráttur

**A)** Fylgiskjal 1: *Call for Action by the European Safe Abortion Networking Group for International Safe Abortion Day, 28 September 2023, týtt til Føroyskt*



## Keldulisti

[1] International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights
[2] Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women.
[3] CEDAW/C/DNK/CO/9
[4] Sundhedsfaglige aspekter forbundet med at ændre abortgrænsen.
[5] The World's Abortion Laws. The definitive record of the legal status of abortion in countries and territories across the globe. Center for Reproductive Rights.. June 9, 2023
[6] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022.
[7] Statement and Call for Action by the European Safe Abortion Networking Group for International Safe Abortion Day, 28 September 2023
[8] WHO/RHR/19.21
[9] Lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
[10] Fosturtøka í Føroyum - Tilvild og lógloysi, 2022
[11] Turid Hermannsdóttir. Maneuvering in Silence : Abortion Narratives and Reproductive Life Histories from the Faroe Islands. 2022.
[12] Fosturtøka í Føroyum - Tilvild og lógloysi, 2022
[13] Skorini, Heini í, and Herit Albinus. "Pro-Life, Pro-Choice and Everything in between: A Quantitative Study of Popular Attitudes on Abortion in the Faroe Islands: Ímillum Frítt Val Og Pro Vita: Ein Kvantitativ Kanning Um Fólksligan Hugburð Til Abort í Føroyum." Fróðskaparrit - Faroese Scientific Journal, 2024, pp. 151-77, https://doi.org/10.18602/b4vzgk76.
[14] Sex & Samfund vil tage opgør med forældet abortgrænse i Danmark, 8. januar 2023
[15] Sundhedsfaglige aspekter forbundet med at ændre abortgrænsen
[16] Ny måling: Næsten hver anden dansker (47,6%) støtter nu forslaget om at hæve abortgrænsen til 18. uge
[17] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022.
[18] Lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
[19] Remissvar avseende En förändrad abortlag (SOU 2025:10)
[20] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022
[21] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022
[22] När ändras lagen om hemaborter, Lena Hallengren?, 2021
[23] En förändrad abortlag - för en god, säker och tillgänglig abortvård SOU 2025:10
[24] Greene, Jo, et al. "Seeking Online Telemedicine Abortion Outside the Jurisdiction from Ireland Following Implementation of Telemedicine Provision Locally." BMJ Sexual & Reproductive Health, vol. 48, no. 4, 2022, pp. 259-66, https://doi.org/10.1136/bmjsrh-2021-201205.
[25] Reynolds-Wright, John Joseph, et al. "Telemedicine Medical Abortion at Home under 12 Weeks' Gestation: A Prospective Observational Cohort Study during the COVID-19 Pandemic." BMJ Sexual & Reproductive Health, vol. 47, no. 4, 2021, pp. 246-51, https://doi.org/10.1136/bmjsrh-2020-200976.
[26] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022
[27] SBU, 2023, Utvärdering av att ta det första läkemedlet (mifepriston) utanför vårdinrättning vid medicinsk abort.
[28] Opgørelse over provokerede aborter, eSundhed.dk
[29] Abortregisterets årsrapport, Folkehelseinstituttet 2025
[30] Statement and Call for Action by the European Safe Abortion Networking Group for International Safe Abortion Day, 28 September 2023
[31] Best practice in abortion care. Royal College of Obstetricians and Gynaecologists. March 2022
[32] Abortion care guideline. Geneva: World Health Organization; 2022
[33] Lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
[34] En förändrad abortlag - för en god, säker och tillgänglig abortvård SOU 2025:10
[35] Statement and Call for Action by the European Safe Abortion Networking Group for International Safe Abortion Day, 28 September 2023
[36] Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin). 23/09500-48.
[37] Heildarendurskoðun laga nr. 25/1975, um ráðgjöf og fræðslu varðandi kynlíf og barneignir og um fóstureyðingar og ófrjósemisaðgerðir. Nóvember 2016

**1:** Fullfíggjaða avkriminalisering av abort í øllum londum. Hettar skal gerast skaðafyribyrgjandi, so at man kann fyribyrgja deyða í barsilsongini og sjúku, harafturat at tryggja at øll njóta gott av menniskjarættindinum, kropsligum sjálvræði, og frítt kunnu velja móðurskap.

**2:** Tryggja øllum fría atgongd til trygga, lógliga abort, so tíðliga sum gjørligt og so leingi sum tørvur er, við fríðum vali av abort veitingar hátti.

**3:** Sjálvveitta medisinska abort við abortpillarum upp til 12. viku skal vera lógligt í øllum londum, júst sum viðmælt av Altjóða Heilsustovninum.

**4:** Góðkenning av abort heiliváginum Misoprostol og samansetingina við Mifepristone sum abortelvandi heilivág. Medisinskar abortpillarar eru ein tryggur háttur at veita abort, ikki einans í fyrsta trimestri men eisini í seinnu trimestrunum, og eru á listanum av grundleggjandi heilivági hjá Altjóða Heilsustovninum.

**5:** Øll lond skulu seta viðmælini um abortrøkt hjá Altjóða Heilsustovninum frá 2022 í gildi, og seta í verk tilbúgvingar tilboð fyri allar heilsutænastuveitarar, her ímillum apotekarar, ið kunnu veita abort tænastur.

**6:** Økja atgongd til abort yvir 12. viku, við at vátta til- og útbúgving til jarðarmóðrar, sjúkrarøktarfrøðingar og læknar.

**7:** Abort reglugerðir skulu verða kynsumfevnandi, við øðrum orðum vera galdandi fyri kvinnur, gentur og øll ið kunnu blíva upp á vegin og tørva eina abort.



## Innleiðing

Abort er ein vanlig og trygg heilsurøktartænasta ið uml. tríggjar út av tíggju kvinnum, fáa tørv á í teirra lívi. Øll eiga at hava rættin til at ráða frítt yvir egnan kropp, harumframt valið um nær, um og hvussu man ætlar at byrja eina familju. Atgongd til trygga og álítandi abortrøkt er ein grundleggjandi partur av rættinum til heilsurøkt, ið er tryggjaður í menniskjarættindasátmálunum.[1][2] Hóast hettar, so avmarkar ein 69 ára gomul lóg enn atgongdina til abort í Føroyum. Lógin ið er frá 1956 er mett at verða í stríð við kvinnurættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum (CEDAW). Nevndin hjá CEDAW hevur fleiri ferðir heitt Føroyska løgtingið á at dagførða núðverandi lóggávuna. [3]

Føroyska lóggávan er ein av mest víðgongdu avmarkingunum á abort í heimsnorðinum. í Norður-og Vesturevropa er tað einans Póland, og smálondini Andorra, Liktinstein, Malta, og Monako ið hava samsvarandi lóggávur.[4][5] Í 2018 yvirtók føroyska heimastýrið abortlóggávuna frá Danmark, og hettar hevði við sær at eitt alt størri orðaskifti um abortrættindi, og núðverandi lóggávuna fór fram í Føroyum. Tað er sum lið í hesum orðaskiftinum at stið eru tikin at seta átakið Abort.fo í verk. Abort.fo hevur sum endamál at leggja pall til røddir ið stríðast fyri eina tíðarhóskandi dagførðing av abort lóggávuni í Føroyum. Tað er okkara sannføring at Føroyar eiga at standa á odda á abortøkinum. Harumframt er tað okkara sannføring at ein og hvør abortlóggáva, skal grunda á tíðarhókandi heilsufrøði og menniskjarættindi, við ástøði í abort viðmælunum hjá Altjóða Heilsustovninum.

## Grundarlag

Á heimsdegi fyri trygga abort 2023 útgav "The European Safe Abortion Networking Group" eitt felagsskriv sum heitti á øll lond í Evropa, at dagførða teirra abortlóggávur so at tey samsvara við viðmælini um abortrøkt, hjá altjóða heilsustovninum (WHO) ið bleiv dagførd í 2022.[6] ímillum teimum 44 felagsskapunum ið skrivaðu undir áheitanina, vóru stóru skandinavisku felagsskapirnir Sex og Samfund (Danmark), Sex og Politikk (Norra), og RFSU (Svørríki), umframt altjóða felagsskapurin Amnesty International.[7]

Ein og hvør viðgerð av abort lóggávuni skal grundast á álítandi og prógvaðum heilsufrøðiligum viðmælum frá felagsskapum, sum til dømis WHO. Abortrøkt ið samsvarar við hesi viðmæli mugu metast sum trygg, og eru enntá tryggari enn at fara ígjøgnum ein heilan graviditet. Konservativar og gamlar lóggávur ið avmarka atgongdina til abort kunning, heilivág og røkt seta lívini hjá teimun ið tørva abort í vanda. 45% av øllum abortum ið hava verið framdar kring hemin seinastu árini, hava verið ótryggar, eftir sum at tær ikki hava liva upp til viðmælini hjá WHO. Líkamikið hvat, fara fólk at leita sær til abortrøkt, men har sum abort er avmarka við lóg, fígging ella sosialt kann tað hava við sær at ótryggar abortir vera framdar. Fólk eru í vanda fyri at leita sær til eina ótrygga abort um tey møta eina ella fleiri av hesum avmarkingum: 1) lóggávur sum avmarkað abort, 2) vánaliga atgongd til heilsutænastir, 3) stórar útreiðslur, 4) abort stigma, 5) heilsurøktarfólk ið nokta at veita abort tænastur,

Um nakað mark skal setast, so má tað í minstalagi vera upp til 18. ella 22. viku. Abort lóggávan má leggjast um so at hon ikki longur er ein straffilóg men heldur ein heilsulóg. Hettar inniberð eina fullfíggjaða avkriminalisering, ið avtekur allar straffiparagraffir fyri abort og abortrøkt. Harumframt at avmarkingar á hvør kann veita abort og hvar abort kann blíva veitt ikki eru staðfestar við lóg men heldur av heilsuskipanini. Hettar seinasta má opna fyri fjølbroyttum møguleikum fyri abortrøkt, har ímillum fjarlæknaviðtalur og sjálvveiting av abort ið kunnu tryggja lætta atgongd til abort fyri tey ið búgva á bygd og á útoyggja, umframt tey sum eru í einum nærumhvørvi við átrokandi abortstigma.

Ein slík dagførðing av lóggávuni má byggjast uppá viðmælini hjá Altjóða Heilsustovninum, og skal endurskoðast og dagførðast støðugt við nýggjari gransking.

## **Appendix A:** *Call for Action by the European Safe Abortion Networking Group for International Safe Abortion Day, 28 September 2023, týtt til Føroyskt.*

### ***Áheitan: Far til verka!***

*Vit meta at fylgjandi dagførðingar eru tær tídningarmiklu ið kunnu gerast av abort lóggávunum, og er tað ið vit heita øll á at skipa átøk og virka fyri í okkara egnu londum og tværtur um Evropa.*

Í lógar uppskotinum frá 2024, ynskti man at danska orðið "svangerskabsafbrydelse" bleiv útskift við føroyska orðið "fosturtøka."[36] Orðið "fosturtøka" er tætt skylt við íslenska "fóstureyðing." Í 2016 endurskoðaði íslenska Velferðarráðuneytið abortlóggávuna í landinum og kom til niðurstøðuna at orðið "fóstureyðing" hevði ein neiligan eykatýdning og var sera virðisløtt. Viðmælt var tí at brúka orðið "þungunarrof" ístaðin, men eisini var umhugsa orðið "meðgöngurof."[37] Í báðum hesum rapportum var eisini dentur lagdur á at lóggávan skal seta rættin hjá einstaklinginum til abort í miðdepil.

Orðið abort er eitt hóskandi orð at nýta á føroyskum, annars má eitt nýtt orð sum til dømis viðgongulok, ella annað smiðast. Fyri at tryggja tíðarhóskandi málnýtslu í Føroyum heita vit øll á at stríðast fyri at seta í verk kunningarátøk í frama kynsumfevnandi málburð í samsvarar við menniskjarætindi. Umframt at orðið "fosturtøka" verður tikið úr nýtstu á føroyskum vegna neiligu ávirkanina sum orðið hevur á abortstigma í Føroyum. Vit heita eisini øll á at stríðast fyri eina dagførðing av málnýtsluni í lóggávunið so at hon tryggjar øllum rættin til abort.

## Samandráttur

Abort.fo meta at ein tíðarhóskandi abortlóggáva skal inniberða at øll hava rætt til abort sum ein grundleggjandi partur av heilsuskipanini. Heilsufrøði má verða avgerðandi í grundgevingini fyri allar partar av lóggávunið. Hettar hevur við sær at allar abort treytir skullu avtakast, og at einki mark má verða á nær man kann fáa abort.



og 6) óneyðug krøv, so sum kravda bíðitíð ella ráðgeving, góðkenning frá triðja parti so sum eitt abortráð, og ultraljóðkanningar.[8] Tað er av hesum orsøkum, alneyðugt at dagførða abortlóggávuna í føroyum so at hon samsvarar við viðmælini hjá WHO og fyribyrgir umstøður ið seta tey ið hava tørv á abort í vanda, at leita sær til eina ótrygga abort.

## Ein tíðarhóskandi abort lóggáva

### a) Abort treytir

Føroyska abort lóggávan frá 1956, staðfestur at lóglig abort er treyta á ein av fýra umstøðum, ið skulu góðkennast av einum lækna, áðrenn tann ið er upp á vegin kann fáa veitt eina abort. Hesar umstøður eru 1) heilsufrøðiligar umstøður, um lív ella heilsan er í vanda hjá fostrinum ella tann ið er upp á vegin, 2) etiskar umstøður, um graviditeturin er komin fyri seg uttan samtykki, sum partur av kynsligum ágangi ella øðrum orsøkum grundaða í straffilógini, 3) eugeniskar umstøður, um staðfest er at fostrið berur eginleikar ið kunnu hava viknandi avleiðingar á sálarligu og fysisku heilsuna eftur føðing, 4) defektivar umstøður, tann ið er upp á vegin er mett at ikki vera før fyri at ansa eftur einum barni vegna fysiskum ella sálarligum orsøkum.[9] Kanningar vísa at 83% av læknum í føroyum meta at lóggávan ikki verður yvirhildin og at 63% meta at lóggávan ikki er nóg greið tá tað kemur til at meta um nær ein abort lúkar treytinar.[10] Hettar hevur við sær eina óvissu í heilsuskipanini, og at tey ið tørva eina abort mugu leita eftir einum lækna sum tulkar lógina til teirra fyrimun.[11]

WHO viðmælur at øll lond strika teirra treytir fyri abort og dagførða lóggávunar so at tær virða menniskjarættin at frítt velja abort eftur egið ynski. Treyta abort kann viðførða longda viðgerartíð frá at ein abort verður umbiðin til at abortrøktin verður góðkend. Óvissar treytir og lóggávur ið ikki eru grundaðar á menniskjarættindi og viðmælunum hjá WHO gerð tað torført hjá røktarveitarum at tulka lógina. Hettar kann avmarka abort enn meira og hava við sær øktan vanda fyri ótryggum abortum og deyða í barsilsongini. Tí heita vit øll á at stríðast fram ímóti eina fullfíggaða avtøku av treytaðum abortum, so at abort blívur eitt frítt val ið virðar rættin til kropsligt sjálvræði og at virka fyri at framtíðar abort lóggávur í minsta lagi grunda hesar treytir á menniskjarættindi og heilsufrøðiligu viðmælini hjá WHO.

## b) Abort Markið

Um Føroyar skuldi dagført abort lóggávuna í dag, so má man spyrja hvar marki so skal setast? Núverandi lóggávan setur markið á 16. viku. Tvær kanningar úr 2022 og 2024 vísa á at millum 52-54% av føroyingum, svaraðu at tey stuðla fría abort til og við 12. viku.[12][13] Í 2024 setti Framsøkn eitt lóggaruppskot við sama mark fram, ið fall í løgtinginum við 15 atkvøðum fyri og 15 atkvøðum ímóti. 1. juni 2025 dagførdi bæði Danmark og Norra teirra egnu abortlóggávur, so at tann fría abortin fór frá 12. viku og fram til 18. viku. Hettar kom eftur at fleiri felagsskapir, her ímillum Sex og Samfund, ynsktu eina endurskoðan av hvat man meinti var ein forolda lóggáva ið ikki var blivin dagførd í 50 ár.[14] Danska Sundhedsstyrelsen bleiv í hesum samanhangi biðin um at kanna máli og útgav eina rapport har mett var at 12. viku markið ikki longur kann grundgevast heilsufrøðiliga.



Í 2025 viðmælti Svenska Socialdepartementet at broyta svensku lóggávuna so at sjálvveitta abort (Heimabort á svenskum), bleiv loyvd fram til 12. viku. Her afturat útgav Bretska Royal College of Obstetricians and Gynaecologists í 2022 teirra viðmæli um sjálvveitta abort, ið sigur at sjálvveiting er trygg fram til 12. viku, og at eingin gransking vísur á at tað er ótrygt fram til 14. viku.[31]

WHO viðmælur sjálvveiting av abort fram til 12. viku sum ein tryggur og hóskandi veitingar møguleiki fyri øll ið ynskja eina abort. Sjálvveiting styrkur kropsliga sjálvræði og fría vali hjá teimum, ið tørva abort. Samstundis kann tað økja um atgongdina til abortrøkt hjá teimun ið bygva á bygd ella á útoyggjum, ella í umstøðum har ið stigma, ella fíggjarligar umstøður avmarka møguleikan at fara til eitt sjúkrahús.[32] Vit heita tí øll á at stríðast fyri at lóggávan verður dagførd so at sjálvveitt abort verður loyvt, samsvarandi við viðmælini hjá WHO. Samt fyri at kunningarátøk vera sett í verk, sum bjóða seksualundirvísing um sjálvveiting av abort grundaða á tíðarhóskandi gransking og viðmælunum hjá WHO.

## f) Málnýtsla

Í føroysku abort lóggávuni verður orðið "kvinna" nýtt.[33] Í rapportini hjá Socialdepartementet frámæla tey nýtsluna av slíkum kynjaðum orðum, heldur vísa tey á at tosa um "den som är gravid."[34] Hettar samsvarar við áheitanina hjá the European Safe Abortion Networking Group um at øll abort lóggáva skal verða kynsumfevnandi.[35]

Men ímillum møguligar abortveitarar er talan um læknar, jarðarmóðrar, sjúkrarøktarfrøðingar, apotekarar, apotekstarvsfólk og mangt annað.[26] Vit heita øll á at stríðast fyri eina fullfíggjaða avtøku av lóggávuni ið avmarkar hvør og hvar abort kann veitast. Hettar so at kropsliga sjálvræði og tað fría valið hjá teimum ið tørva abort verður virða. Her ímillum 1) opna fyri WHO góðkendum møguleikum so sum hjá jarðarmóðrum at veita abort. 2) apotekarum at útlevera bæði Mifepristone og Misoprostol. 3) fjarlæknaviðtalur so at man kann fáa resept á medisinska abort uttan at skulla fara til ein lækna ella sjúkrahús, og 4) rættin til sjálvveiting av abort fult og partvíst eftur egnum ynski. Eisini skullu altjóða abortveitara NGOir so sum Women on Web og Women Help Women ið fylgja WHO viðmælinum hava loyvi at virka frítt í Føroyum.

## e) Sjálvveiting

Sjálvveitt abort er ein medisinsk abort ið er veitt í heild ella part av teimum ið tørva abort. Næstan allar abortir ið vera framdar í nábúgvalondum okkara eru medisinskar, í 2023 vóru 97% í Svørríki og 85% í Danmark og 94% í Norra í 2024.[27][28][29] Í øllum hesum londum vera hesar longu partvíst sjálvveittar. Lógin avmarkar so at tann í tørvar abort skal møta á einum sjúkrahúsi at taka Mifepristone, men má síðani eftur egnum ynski gjarna fara heim og sjálvveita sær Misoprostol. Í 2023, heittu RFSU, Sex og Samfund og Sex og Politikk á øll lond í Evropa at loyva sjálvveiting av abort fram til 12. viku, í samsvar við viðmælini hjá WHO.[30]



Heldur vísti man á 18. og 22. viku markini í Svørríki og Íslandi samt viðmælið hjá WHO um at avtaka viku avmarkingar sum ein heild. [15] Kanningar hjá Sex og Samfund og Altinget vísa á at kunningarátakið í Danmark hevði við sær at danir fóru frá at uml. 13% vóru fyri at dagførða abortlóggávuna í 2022, til 47% í 2023. [16]

WHO viðmælur at øll lond avtaka viku avmarkingar á abort røkt, vegna at heilsufrøðilig gransking vísur at hesar avmarkingar hava við sær øktan vanda fyri deyða á barsilsongini og versnaða heilsu hjá teimum ið fáa framt abort, umframt at tað hevur við sær pínu og líðing fyri tey ið vera tvungin at gjøgnumførða viðgongutíðina. [17] Tí heita vit øll á at stríðast fyri eina fullfíggjaða avtøku av abort markinum í Føroyum, seta í verk kunningarátøk ið grunda á viðmælunum hjá WHO og at virka fyri at framtíðar abort lóggávur í minstalagi loyva abort fram til 18. viku.

## c) Avkriminalisering

Ífylgi føroysku lóggávuni er abort enn eitt brotsverk, um hon er framd uttanfyri heilsuskipan landsins ella privat sjúkrahús ið fáa almennan stuðul. Tann ið fær framt eina abort uttanfyri lógina, er í vanda fyri revsing við bót ella upp til 3 mánaðar fongsul. Ímeðan ein lækni ið veitur abortrøkt uttanfyri lógligu karmarnar kann revsast við fongsul í upp til tvey ár, og ein aktivistur ið ger tað sama kann revsast við fongsul í upp til fýra ár. Umframt hettar er atgongd til abort heiligvág stýrt av Heilsumálaráðnum saman við løgregluni.

Veiting av abort heiligvági uttanfyri góðkendum veitarum, kann revsast við bót.[18] RFSU viðmælti í 2025 at svørríki avtekur líknandi lóggávur.[19] Sum áður nevnt, hevur óvissan um abort treyturnar við sær eina stóra ósemju ímillum læknar um teir góðkenna eina abort ella ikki. Um har er ótti ímillum læknar í Føroyum fyri møguliga revsing vegna mistulking, hava vit ikki funni nakra kanning um. Gransking uttanlanda hevur hinvegin víst, at líknandi óvissa um lógina hevur havt við sær at tey sum tørva abort, kunnu koma í vanda at blíva útsett fyri umstøðum, ið fella undur tortur og ómenniskjaligari viðgerð.[20]

WHO viðmælur at øll lond avkriminalisera abort, og avtaka allar lóggávur ið áseta revsing og straff fyri at fáa veitt eina abort, harumframt fyri at veita abort og hjálpa við veiting av abortrøkt. Gransking vísur at kriminalisering onga ávirkan hevur á avgerðina um at fáa eina abort, og stegðar ongum frá at fáa eina abort. Tvørturímóti avmarkar tað atgongdina til trygga abort. Tað setur fleiri sum tørva abort í vanda fyri at leita sær til ótrygga abort og fleiri mugu leita sær abort í útlegd. Gransking vísur eisini at kriminalisering lækkar talið av royndum heilsufrøðingum við serkunnleika um abort, og at góðskan á abortrøkt og tænastum versnar. Alt hettar umframt eyka bureaukratiskt yvirlit ið kann avmarka atgongd til abort enn meira.[21] Av øllum hesum orsøkum heita vit øll á at stríðast fyri eina fullfíggjaða avkriminalisering av abort og abortrøkt í Føroyum, og at virka fyri at Misoprostol og Mifepristone verða vart sum grundleggjandi heilivágur av framtíðar abort lóggávum.

## d) Veiting av abort



Núverandi lóggáva sigur at abort einans kann veitast av einum lækna og skal veitast á einum almennum sjúkrahúsi ella einum privatum sjúkrahúsi ið fær almennan stuðul. í 2021 bleiv líknandi lóggávan í Svørríki kritisera av RFSU og svenska Jarðmóðra felaginum fyri at verða avoldað, tí at hon avmarkar hvør og hvar ein abort kann blíva veitt.[22] Eitt fleirtal á ríksdegnum efturspurdu í 2023 at Socialdepartementet kom við einum tilmælið til hvussu ein slík dagførðing kann orðast og síðani er ein rapport komin út í februar 2025. Rapportin viðmælur at lóggávan ikki skal avmarka hvør kann veita abort, men heldur lata tað verða upp til heilsuskipanina at avgera, so at tað samsvarar við viðmælini hjá WHO og tann serkunnleika ið er tøkur í landinum. Dentur bleiv lagdur á at opna upp serliga fyri jarðarmóðrar at kunna útskriva abortelvandi heiligvág og veita abort. Rapportin viðmælur eisini at lóggávan ikki skal avmarka hvar ein abort kann veitast, heldur skal opnast upp fyri abortrøkt uttanfyri sjúkrahúsini, so við fjarlæknaviðtalum (Telemedicine á enskum), útflýggjan av abort heiligvági á apotekinum og sjálvveiting (Heimabort á svenskum).[23] Líknandi broytingar í lóggávuni eru framdar í Írlandi og Bretlandi í 2020.[24][25]

WHO viðmælur ímóti lóggávum ið avmarka hvør kann veita abort, sum mótsvarar teirra viðmælum. Her umframt viðmæla tey at opna verður fyri fjølbroyttar valmøguleikum av abort veitarum, har ið serfrøði og lokalar umstøður loyva hesum. Hettar fyri at tryggja kropsliga sjálvræði hjá teimun ið tørva abort at frítt velja hvussu tey fáa veitt abort. Hvør er egna til at veita ymskar abortrøktar møguleikar er ymiskt.